# Lívligt vinnulív er tekin um dynamikk

**– Tað er tekin um eitt livandi og dynamiskt vinnulív, at fyritøkur í Klaksvík verða seldar, lagdar saman og byggja nýggjar bygningar, sigur Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa. Hann heldur, at gongdin í fleiri vinnugreinum er fram ímóti færri og størri eindum, sum koma at standa sterkari í kappingini við miðstaðarøkið**

VINNULÍV
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*– Vit síggja longu nú, at eysturoyingar keypa seg inn í fyritøkur í Klaksvík, og klaksvíkingar keypa seg inn í fyritøkur í Eysturoynni. Hetta kemst av tunlinum, og vit fara at síggja nógv meira av slíkum samstarvi frameftir. Við tíðini koma fyritøkurnar í Eysturoynni og Norðoyggjum at standa saman í kappingini við miðstaðarøkið, sigur Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa*

Vinnulívið í Klaksvík er lívligt í hesum døgum. Fyritøkur verða seldar og keyptar, stóru bakaríini verða løgd saman í eitt felag, fyritøkur byggja nýggjar og stórar bygningar, og plássið á stóra ídnaðarøkinum á Borðoyavík er uppi.

Harafturat eru aðrar stórar ætlanir meira og minni frammi – nýggjur stórhandil á Stongunum, nýggjur handilsdepil á Sandinum, og lokali peningarstovnurin ætlar sær út til onnur øki í landinum.

– Tað ringasta, sum kann henda í vinnulívinum, er, at einki hendir. Tí er tað eitt tekin um eitt livandi og dynamiskt vinnulív, at fyritøkur í Klaksvík verða seldar, lagdar saman og byggja nýggjar bygningar, sigur Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa.

– Eg minnist tíðina, tá ið tað vóru fýra ella fimm bakarí í Klaksvík, men tíðin er farin frá tí. Nú eru krøvini til framleiðsluna nógv størri, og tí er tað trupult at hava fleiri bakarí í einum øki við 6000 fólkum, sigur hann.

## Færri matvøruhandlar

Tey tvey bakaríini í Klaksvík, sum nú gerast eitt, eru eitt tekin um tíðarandan og krøvini til fyritøkur nú á døgum. Gongdin er fram ímóti færri og størri eindum

– Tað var eitt gott trekk frá báðum bakaríunum, at annar valdi at selja og hin at keypa, tí eitt stórt og sterkt bakarí er nógv betur fyri í kappingini, enn tvey smærri bakarí høvdu verið, sigur Eyðfinn Reyðberg.

Tekin eru eisini um líkandi gongd, tá ið tað snýr seg um matvøruhandlar. Netto byggir nýggjan matvøruhandil, sum verður næstan líka stórur sum allir hinir matvøruhandlarnir í býnum tilsamans, og nýggju eigararnir av Klaksvíkar Timburhandli ætla somuleiðis at gera nýggjan stórhandil við millum annað matvørum á Stongunum.

– Vit sleppa ikki undan rákinum, at tað verða færri og størri handlar. Hetta er nakað, sum fólk ynskja, og tey fáa tað eisini. Í Klaksvík verður gongdin sum alla aðrastaðni, og eg rokni við, at um nøkur fáa ár verður helvtin av matvøruhandlunum, sum nú eru opnir, eftir í býnum, sigur Eyðfinn Reyðberg.

## Ídnaðarøkið ein sólskinssøga

Tað hevur verið nógv bygging á ídnaðarøkinum á Borðoyarvík seinastu árini. Nú er økið at kalla á tremur við bygningum, og tørvur er á nýggjum ídnaðarøki til fyritøkur, sum ætla at byggja.

– Ídnaðarøkið á Borðoyarvík er ein sólskinssøga. Tað vísir, at tað ber til at vera frammanfyri sína tíð. Hóast ein kreppa kom upp ímillum, og økið lá tómt í nógv ár, so hevur tað skapt møguleikar fyri vøkstri í vinnulívinum í Klaksvík. Tá ið allir bygningarnir á økinum eru lidnar, eru eini 100 arbeiðspláss knýtt at økinum, sigur Eyðfinn Reyðberg.

– Hetta leggur eisini trýst á vinnupolitikkin hjá Klaksvíkar kommunu, tí nú er tørvur á nýggjum ídnaðarøki. Samstundis kann kommunan prísa seg lukkuligan fyri, at fyritøkurnar hava valt at seta seg niður hesumegin tunnilin og ikki hinumegin.

Stjórin í Norðoya Sparikassa heldur, at hóast tað verður ein ávís kapping millum fyritøkur í Norðoyggjum og Eysturoynni, tá ið Norðoyatunnilin letur upp, so verður tað við tíðini nógvi størri samstarv millum økini.

– Vit síggja longu nú, at eysturoyingar keypa seg inn í fyritøkur í Klaksvík, og klaksvíkingar keypa seg inn í fyritøkur í Eysturoynni. Hetta kemst av tunlinum, og vit fara at síggja nógv meira av slíkum samstarvi frameftir. Við tíðini koma fyritøkurnar í Eysturoynni og Norðoyggjum at standa saman í kappingini við miðstaðarøkið, heldur Eyðfinn Reyðberg.

## Tunnilin krevur sítt

Gongur tað sum ætlað, letur Norðoyatunnilin upp um góðar sjey mánaðir, og tá verður ein fittur partur av Norðoyggjum bundin saman við meginøkið.

– Tað hevur verið tosað nógv um, at norðoyingar skulu fyrireika seg til undirsjóvartunnilin, men tað er í roynd og veru undirsjóvatunnilin, sum fyrireikar samfelagið til at verða meira kappingarført. Undirsjóvartunnilin krevur nógv av vinnulívinum, og vit síggja nú, at nógvar fyritøkur taka við nýggju avbjóðingini, sigur Eyðfinn Reyðberg.

– Tað er hent nógv seinastu mánaðirnar, og tað fer at henda nógv afturat í vinnulívinum í Norðoyggjum og Eysturoynni. Samstarvið fer at økjast munandi, og við tíðini verða Norðoyggjar og Eysturoyggin sum eitt øki, heldur Eyðfinn Reyðberg.

## Sparikassin fylgir við

Norðoya Sparikassa fer ikki at sita friðarligur í Klaksvík, nú undirsjóvartunnilin fer at lata upp, og Norðoyggjar gerast ein partur av meginøkinum.

Lokali peningastovnurin í Norðoyggjum verður nevniliga ikki bara lokalur í framtíðini, tí Norðoya Sparikassi fer at lata tvær nýggjar deildir upp í næstum.

– Vit fara at lata deildir upp í Runavík og í Havn í 2006, og tá eru vit komin út í trý tey størstu økini í landinum. Tá kunnu tríggir fjórðingar av øllum íbúgvunum í Føroyum koyra til eina deild hjá Norðoya Sparikassa innanfyri eitt korter, sigur Eyðfinn Reyðberg, stjóri.

– Vit fyrireika í løtuni nýggju deildirnar, og vit eru sera spent upp á hetta. Vit halda, at Norðoya Sparikassi hevur nakað at bjóða í kappingini við hinar peningastovnarnar, sigur hann.

## Tað er gongd í miðbýnum

Í eina tíð hevur verið tosað um at byggja ein nýggjan handilsdepil í miðbýnum í Klaksvík. Stór útfylling er gjørd innast á vágni í Klaksvík, og har skal handilsdepilin eftir ætlan byggjast einaferð í framtíðini.

Men eingin ítøkilig ætlan um bygging er komin fram alment enn, og síðani nýggir eigarar tóku yvir í Klaksvíkar Timburhandli, hava teir boðað frá, at teir hava ætlanir um at gera ein nýggjan stórhandil í bygninginum hjá Timburhandlinum á Stongunum.

– Tað er gott, at fólk hava visiónir og ætlanir við sínum virksemi, og eg ynski eigarunum av Klaksvíkar Timburhandli vælkomnum til Klaksvíkar. Ein nýggjur handil á Stongunum er eingin forðing fyri, at ein handilsdepil verður gjørdur í miðbýnum, tí ein býur skal innihalda nógvar møguleikar, og hesir báðir møguleikar nýtast ikki at forða hvørjum øðrum, sigur Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa.

Hann er ein av teimum, sum arbeiðir við nýggja handilsdepilinum á Sandinum í Klaksvík.

– Tað hevur ongantíð verið ætlanin, at ein handilsdepil í miðbýnum skal støvsúgva alt annað virksemi í býnum. Tað verður pláss fyri nógvum handilsligum virksemi fyri at tað, um eitt stórt sentur verður bygt.

Og hóast eingin ætlan er løgd fram alment enn um hesa bygging, so livir hugskotið framvegis.

– Tað er gongd í ætlanini um ein handilsdepil í miðbýnum, og tær kanningar, sum vit hava gjørt higartil, vísa, at tað ber til við slíkum depli. Skal Norðoya Sparikassi verða við í ætlanini, so skulu vit eisini tryggja okkum, at okkara íløga kann kasta nakað av sær, sigur Eyðfinn Reyðberg.

– Ein slík ætlan er umfatandi, og hon tekur tíð at fyrireika. Vit brúka ta tíð, sum er neyðug, og vit fara ikki at leypa framav, sigur hann.

**ek**